


# Jarðfeingi marknaðarførir landgrunnin í London

Jan Müller

19.03.2014 - 15:13

Oljan.fo

Jarðfeingi luttók í døgunum 11. til 13. mars á Appex ráðstevnuni í London, sum er fyriskipað av Evropeisku deildini hjá AAPG (American Association of Petroleum Geologists) skrivar Jarðfeingi á síni heimasíðu.

Hetta er ein árlig ráðstevna, har oljufeløg hava møguleika at selja leitimið, tænastuveitarafeløg møguleika at selja tænastur til oljuvinnuna, og umboð fyri almennar oljumyndugleikar í ymiskum londum hava møguleika at vísa á áhugaverd umráði í teirra øki.

Jarðfeingi var umboðað á ráðstevnuni við bási og fyrilestri, har víst varð á møguleikar á tí føroyska økinum. Heri Ziska, jarðfrøðingur, helt fyrilestur um Anne Marie leitingarmiðið.

Ein kann siga, at hetta er í tráð við ynskið hjá landsstýrismanninum í vinnumálum, sum fegin sær,

at landgrunnurin verður marknaðarførdur meira í útlandinum. Í løtuni er eitt uppskot um at brúka førleikapengar til marknaðarføring fyri á tingi.